# Flottir bilar úr Hetlandi

**Í døgunum 7. til 12. juni var eitt ferðalag úr Hetlandi í Føroyum við nøkrum flottum gomlum bilum sum t.d. Ford Zodiac, Morris Minor, Humber Sceptre og ein Vincent motorsúkkla við síðuvogni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Beint eftir stóru framsýningina av ellisakførum í Hetlandi fyrst í juni, Shetland Classic Motor Show, komu nøkur flott og áhugaverd ellisakfør til Føroya, talan var um fimm bilar og eina motorsúkklu við síðuvogni.

Bilarnir vóru: Morris Minor Traveller frá 1959, Humber Sceptre frá 1963, Humber Super Snipe frá 1966, Ford Zodiac frá 1964, Triump Spitfire frá 1974 og ein Vincent motorsúkkla frá 1947 við síðuvogni.

Fyri tveimum árum síðan skipaði Føroya Ellisakfør fyri einum túri til Shetland Classic Motor Show, sum er eitt lutfalsliga stórt tiltak við nógvum áhugaverdum akførum. Á tí framsýningini vóru motorsúkklur, persónbilar og lastbilar av kendum gomlum merkjum - væl hildin akfør í upprunastandi.




*Hetlendsk ellisakfør á parkeringsøkinum hjá Hotel Føroyum*




*Humber Super Snipe frá 1966. Hetta er ein stórur og rúmligur bilur*




*Brian H. Gifford í Hetlandi, sum var á Føroyum við tí reyða Humber Sceptre frá 1963, eigur tveir Humber. Hann sendi okkum hesa myndina av báðum bilunum, hin er ein Humber Sceptre frá 1965*



*Vincent motorsúkkla frá 1947 við síðuvogni.*




*Ford Zodiac frá 1964. Hesir bilarnir koyrdu í Føroyum sum hýruvognar, bæði sum Zodiac og Zephyr. Zodiac var luksusútgávan*







*Humber Sceptre frá 1963. Humber vóru nakrir av í Føroyum í 40- og 50-unum*



*Humber Sceptre frá 1963 innan*